Landssjúkrahúsið:

# Valið seinkar nýggja bygninginum

**Upplatingin av nýggja bygninginum á Landssjúkrahúsinum verður seinkað í nakrar mánaðir. Orsøkin er valið, sum varð útskrivað í úrtíð. Landsstýrið fær nevniliga ikki játtað tann neyðuga peningin til rakstur og innkeyp av útbúnaði, so leingi tað bert virkar sum ein fyribils starvsstjórn**

SJÚKRAHÚSIÐ
*Stefan í Skorini*



*Sjúkrahússtjórin Poul Geert Hansen á tí nýggju intensivu deildini á Landssjúkrahúsinum. Enn vantar medicoteknisk útgerð fyri slakar 40 milliónir krónur í nýggja bygninginum, og bíðað verður nú eftir at nýggja løgtingið fer at játta peningin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Ætlanin var, at nýggi og stásiligi bygningurin á Landssjúkrahúsinum skuldi lata upp tann 23. februar, tá Landssjúkrahúsið eisini kundi hátíðarhalda 80 ára dagin. Mongum brestur ætlanin, og hetta verður nú av ongum.

Í skrivandi stund standa stovurnar gapandi tómar og bíða eftir útgerð og útbúnaði av ymsum slag.

Orsøkin er hon, at fíggjarlógin fyri 2004 ikki er samtykt. Tí fær Familju- og heilsumálaráðið ikki játta tann neyðuga peningin, sum sjúkrahússtjórin situr og bíðar eftir.

Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 vórðu upprunaliga 35 milliónir krónur settar av til keyp av medicotekniskari útgerð. Harumframt vórðu 2,7 milliónir krónur settar av til rakstur og 4 milliónir krónur til trettan nýggj heilsustarvsfólk í hesum árinum. 4 milliónir krónur vórðu settar av til keyp av útbúnaði í 2005, og 5 milliónir krónur eru longu nýttar til keyp av tungari útgerð.

Í ringasta føri letur nýggi bygningurin ikki upp fyrr enn eftir summarfrítíðina. Hetta er tó lítið sannlíkt, tí væntandi fer nýggja løgtingið sum skjótast at avgreiða viðurskiftini viðvíkjandi játtanini til tann nýggja bygningin.

Men um nýggja løgtingið skal viðgera alla fíggjarlógina út í hvønn smálut, áðrenn játtanin kemur í rættlag, so er vandi fyri, at nýggi bygningurin ikki letur upp fyrr enn í september.



*– Tað er sera óheppið, at vit ikki fáa hildið okkara tíðarætlan, tí vit høvdu fyrireikað okkum til at flyta inn í mars mánaði, sigur Poul Geert Hansen, sum her gongur í tí heldur tómligu gongini á sjúkrahúsinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Vónaðu at halda fram

– Tað er sjálvandi sera óheppið fyri okkara viðkomandi, at tíðarætlanin ikki heldur. Okkara fólk hava fyrireikað okkum alt heystið til upplatingina og hava væntað, at alt skuldi ganga sum ætlað, sigur Poul Geert Hansen, sjúkrahússtjóri í viðmerking til hesi tíðindini. Hann væntar og vónar, at sjúkrahúsið kann lata upp í mai mánaði.

Virkandi landsstýrið, sum bert er ein starvsstjórin inntil nýtt landsstýrið tekur við, kann bert játta pening til verandi virksemi umframt tær sáttmála- og lógarbundnu útreiðslurnar, soleiðis at átiknar skyldur verða hildnar.

Sjúkrahússtjórin hevði annars vónað, at tað fór at bera til at halda áfram við at bíleggja og keypa útbúnað, hóast fíggjarlógin ikki varð samtykt. Sjúkrahúsið hevur nevniliga havt eina verklagslóg at halda seg til, og boðini úr Heilsumálastýrinum vóru upprunaliga, at sjúkrahúsið við heimild í hesi lóg kundi halda fram við at bíleggja útgerð í nýggja árinum, hóast eingin fíggjarlóg fyri 2004 var samtykt.

Stórur ivi valdaði tó um hesa heimild, og tí skuldi hetta kannast í Løgmálaráðnum. Úrskurðurin úr Løgmálaráðnum var, at eingin heimild var at játta pening til keyp av útbúnaði í hesi lóg, og tí fall alt til jarðar.

Sosialurin hevur fingið innlit í úrskurðin frá Løgmálaráðnum, og hann sigur í stuttum, at tá heimild hvørki er í fíggjarlógini ella í eini bráfeingis játtanarlóg kann útgerð ikki keypast.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum helt upprunaliga, at hon kundi bíleggja útgerð uttan trupulleikar, men eina viku inn í nýggja árið, koma boðini úr Løgmálaráðnum um, at hetta ikki bar til.

Um landssjúkrahúsið hevði havt bílagt útgerðina fyri ársskiftið, hevði landsstýrið kunnað játtað peningin við heimild í verklagslógini.

### Bill er harmur

Bill Justinussen, landsstýrismaður við heilsumálum, sigur, at hann bað embætisverkið kanna allar møguleikar fyri at fáa hesa játtanina uppá pláss, men kanningarnar vístu, at hetta tíverri ikki lat seg gera.

– Tað er sera harmiligt, at val verður útskrivað beint fyri ársskiftið, og vit fara inn í eitt nýtt ár við ongari fíggjarlóg. Í núverandi støðu fáa vit fáa bert hildið verandi virksemi í gongd, sigur Bill Justinussen, landsstýrismaður við heilsumálum.

Sitandi landsstýrið hevur nevniliga ikki loyvi at gera nakra nýggja bindandi avtalu ella játta pening til nýggjar keypssáttmálar. Tað nýggja landssýrið skal nevniliga hava møguleika at raðfesta øðrvísi enn undanfarna stýri.

Soleiðis sum støðan er nú, er sjúkrahúsið í eini bíðistøðu. Einki verður avgjørt fyrr enn eftir valið, og tí valdar nakað av óvissu um nýggja bygningin á sjúkrahúsinum. Í skrivandi stund standa stovurnar tómar og bíða eftir útgerð.

Sjúkrahússtjórin vónar innarliga, at nýggja løgtingið fer at geva teimum heimild at bíleggja útgerðina sum skjótast.



# Samskip opnar nýggja farmaleið um Føroyar í næstum

**Farmaflutningurin hjá Samskip millum Ísland og meginlands Europa fær undirtøku og Tórshavn skal nú innganga sum millumhavn í nýggjari siglingarleið til Immingham og Rotterdam**

LOGISTIKKUR
*Búi Tyril*



*Føroyar koma at innganga sum partur av nýggju rutuni hjá Samskip*

Tann íslendska flutningsfyritøkan Samskip fer í næstum at lata upp eina nýggja farmaleið millum Ísland, Føroyar, England og Holland. Hetta upplýsti felagið í einum tíðindaskrivi í desember og keldur vátta nú at ætlanin er við at koma undir land.

– Vit hava leigað eitt skip til at sigla millum Ísland og europeiska meginlandið og Føroyar koma at innganga sum partur í hesari farmaleið, sigur Sverrir Hannesson á logistikkdeildini hjá Samskip.

– Rutan kemur sum svar upp á ein vaksandi eftirspurning á kapasiteti og fer at verða tænt av »Skaftafell«, eitt 5000 tons bingjuskip sum vit hava leigað til endamálið.

Samskip kemur harvið at hava 14 farmaskip í fastari siglingarleið og fleiri onnur í leigusigling og serskildum góðsflutningi. Við »Skaftafell« hevur felagið trý skip í fastari farmaleið millum Ísland og meginlands Europa. Farandi úr Reykjavík hvønn 14. dag, skal tann nýggja rutan leggjast um Grundartanga á Vesturlandinum og Reyðarfirði á Eysturlandinum áðrenn hildið verður fram til Tórshavn og víðari til Immingham í Englandi og Rotterdam í Hollandi.

Sum skilst á Samskip er eftirspurningurin á sjófrakt millum Ísland og europeiska meginlandið vaksin nógv undir farna ári.

– Vit avgjørdu at tíðin var nú komin til at økja okkara tænastu á hesum leiðum, segði Knútur G. Hauksson, stjóri hjá Samskip í Íslandi.

– Við hesum stigi bøta vit eisini um okkara tænastur til eystara partin av Íslandi samstundis sum vit økja um talið á tøkum siglingum millum landið og kontinentala Europa.

»Skaftafell« er yvir 100 metrar langt, tekur 364 bingjueindir og er útgjørt við tveimum 60 tons kranum við førleika at saman lyfta upp til 120 tons í senn.

Verandi farmaskip sum Samskip hevur í rutu millum Ísland, Stóra Bretland, Skandinavia og meginlands Europa, nevniliga »Arnarfell« og »Helgafell«, halda fram óbroytt í sínum leiðum. Tey bæði skipini eru ikki heilt ókend hjá okkum eftirsum Samskip fyrr hevur verið inni á tí føroyska marknaðinum í samstarvi við Skipafelagið Føroyar.

# Bók um kroppin




*Tað eru Jákup Eyðun Joensen og Jákup í Skemmuni, sum hava týtt »mannakroppin«*

**Mannakroppurin eitur nýggj bók, sum Skúlabókagrunnurin í samstarvi við enskt forlag hevur givið út**

ÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

Føroya Skúlabókagrunnur hevur í samprenti við enska forlagið Dorling Kindersley givið eina nýggja upplýsandi og áhugaverda bók út um mannakroppin. Tað serliga við hesari útgávuni er, at hon er á tremur við frálíkum og frágreiðandi fotomyndum, ið serfrøðingar hava tikið. Harumframt eru glærur at venda, so til ber hjá lesaranum at síggja, hvat ið er innan í høvdinum, hví hjartað slær, hvagar maturin fer, og hvussu armar og bein røra seg.

Læknaligir serfrøðingar hava skrivað tekstin, ið er greiður og lættur at lesa, eisini hjá børnum og ungum. Tí er bókin væl høskandi sum lærubók í fólkaskúlanum, men eisini sum handbók hjá teimum, ið ynskja at kunna seg um mannakroppin, og hvussu hann ber seg at. Jákup Eyðun Joensen og Jákup í Skemmuni hava týtt tekstin úr enskum. Aftast í bókini eru leitorð.

Mannakroppurin er 38 síður og kostar 138,00 kr.


